# KUNNGERÐ

## Serstøk byggisamtykt og broytingar av byggisamtyktum fyri Tórshavnar kommunu

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 21. januar 2011 hevur samtykt uppskot til eina nýggja serstaka byggisamtykt, tvær broytingar av almennu byggisamtykt og eina broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Hvítanes.

**SERSTØK BYGGISAMTYKT:**
Serstaka byggisamtyktin snýr seg um skipan og bygging á økinum við Marknagil.

Serstaka byggisamtyktin fevnir um ognirnar 917, 918a, 918b, 918c, 918d, 918e, 918f, 919a, 919b, 919c, 1099, 1100, 1101, 1102a, 1102b, 1102c, 1104d, 1173a, 1173b, 1173c, 1174 og 1177, Tórshavn.

**BROYTING AV ALMENNU BYGGISAMTYKTINI:**
Ætlaða broytingin er ein regulering av almennu byggisamtyktini sambært uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri øki og regulering í sambandi við broytta Marknagilsvegin.

Ætlaða broytingin fevnir um ognirnar 893ba, 893bb, 893bc, 894a, 1104a, 1104b, 1104c, 1104d, 1104f, 1104g, 1104h, 1104k, 1103, 1102d, 1102c, 918b, 1099, 1100, 1101 og 1173a, Tórshavn.

**BROYTING AV ALMENNU BYGGISAMTYKTINI:**
Ætlaða broytingin er at víðka A1-øki fyri allar traðirnar omanfyri Marknagilsvegin frá Hjaltarók til Marknagilsá, soleiðis at markið millum A1-øki og 4. grundumr. fylgir matrikulmarkinum.

Ætlaða broytingin fevnir um ognirnar 1176, 1214a, 1215a, 1216a, 1217a, 1218a, 1223a, 1224a, 1225, 1226a 1227a, 1228a og 1230a, Tórshavn

**BROYTING AV SERSTØKU BYGGISAMTYKTINI FYRI HVÍTANES:**
Ætlaða broytingin er ein regulering av markinum millum B-bústaðarøki og 4. Grundumr. soleiðis at hetta fylgir matrikulmarkinum.

Ætlaða broytingin fevnir um ognirnar 116, 108b og 90b, Hvítanes.

**FRAMLØGA**
Tilfar, sum lýsa uppskot til serstaka byggisamtykt og ætlaðu broytingarnar liggja frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 7. til og við 28. februar 2011, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot vera at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 21. mars 2011.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

LÆRLINGUR

Søkt verður eftir HVS Lærlingi til
pf Maria Poulsen

Vit vænta at tú ert raskur/røsk og Fyrikomandi. Koyrikort er Eitt krav.

Ert tú tann rætti persónurin, ert tú vælkomin at senda eina umsókn. Til ap@mp.fo
Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 14.02.2011

P/F Maria Poulsen
Smyrilsvegur 8
Postboks 182
FO 110 Tórshavn



Meiri fæst at vita við at ringja til Arthur Poulsen á tlf. 312 000 Ella send ein mail á ap@mp.fo

pf Maria Poulsen
Box 182 · FO-110 Tórshavn

P/F Maria Poulsen er største HVS virkið í Føroyum við handli,verkstaði og búnýti. Í dag starvast um 35 fólk í fyritøkuni. Alt innan heilsølu og smásølu.

LEIÐARI TIL REYÐA KROSS FØROYA

Vilt tú leiða dagliga arbeiðið hjá einum av Føroya størstu hjálparfelagsskapum? Vilt tú verða millum virðismestu aktiv hjá teim treingjandi?

So hevur tú møguleikan nú!

Tí Reyði Krossur Føroya sóknast eftir dagligum leiðara at skipa fjølbroytta arbeiði felagsins. Í fyrsta umfari bjóða vit tær hálvan starvsdag í eini tríggja mánaða royndartíð, men ert tú rætta fólkið, kann talan skjótt gerast um fast starv fulla tíð. Lønin verður eftir avtalu millum teg og Reyða Kross Føroya.

Um teg
Tú hevur fram um alt góð sosial evni, dugir væl at skapa og røkja sosial netverk og ert eisini ein góður samskipari.

Harumframt vænta vit eisini, at tú:
- Hevur roknskaparkunnleika
- Arbeiðir sjálvstøðugt og ert røkin
- Skrivar og talar føroyskt, enskt og danskt
- Dugir at kjakast alment á enskum
- Vilt luttaka á størri og smærri fundum í Føroyum og uttanlands

Umsóknir
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum skulu sendast til Bryggjubakka 10, boks 1015, 110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi í síðsta lagi 21. feb. 2011.

Meira fæst at vita um starvið hjá Suna Vinther, formanni, á tel. 283630 og á suni@redcross.fo.

Les meira um Reyða Kross Føroya á www.redcross.fo.

Reyði Krossur Føroya